# Framtaksgrunnurin setir 2 milliónir í nótabát

Framtaksgrunnurin eigur 40% av partapeninginum í nótabátinum Research, sum partafelagið Miðalberg í Vági keypti í síðstu viku úr Hetlandi. Báturin er fyrst og fremst ætlaður at fiska sild og lodnu.

NICLAS JOHANNESEN



Niels Dann West: Viðtøkurnar gera tað eisini møguligt hjá Framtaksgrunninum at seta pening í skip

Framtaksgrunnurin er nú farin upp í reiðaravirksemi.

Grunnurin hevur sett umleið 2 mió. kr. í nótabátin Research, sum partafelagið Miðalberg í Vági hevur keypt úr Hetlandi.

Hetta eru 40% av einum samlaðum eginpeningi upp á 5 mió. kr. Keypsprísurin er 11,5 mió. kr., og tað er Føroya Sparikassi, ið fíggjar bátin.

Báturin skal fyrst og fremst royna eftir sild og lodnu. Research kann annars eisini brúkast sum trolbátur.

## Projekt

Niels Dann West, umsitingarligur leiðari á Framtaksgrunninum, sigur, at sambært viðtøkum grunnsins, so er onki í vegin fyri, at grunnurin eisini setur pening í skip. Í donsku orðingini verður lagdur dentur á »nye virksomheder« og »projekter«.

Niels Dann West sigur, at Framtaksgrunnurin aftan á at hava hugt eftir útrokningunum fyri bátin helt, at talan er um eitt skilagott projekt.

Eisini telur tað við, at landsstýrið hevði givið bátinum innflutningsloyvi. So landsmyndugleikarnir hava somuleiðis álit á, at fyritreytir eru fyri, at báturin fer at bera seg.

Framtaksgrunnurin hevur sambært egnar viðtøkur ikki loyvi til at hava meirlutan í einum projekti, uttan so at talan eru um broytingar í bygnaðinum ella tá fyritøkur fara av knóranum.

*Herálvur Joensen, løgfrøðingur á Oljufyrisitingini:*

# – Veruligu oljuleitingarnar byrja tá oljufeløgini fáa leitingarloyvi og framleiðsurætt



Herálvur Joensen, løgfrøðingur: – Veruligar oljuleitingar byrja, tá oljufeløgini fáa leitingarloyvi við rætti til at framleiða ta olju, ið tey møguliga finna.
Slík leitingarloyvi eru ikki heimilað í forkanningarlógini, so veruligar oljuleitingar byrja sjálvsagt ikki fyrr enn løgtingið hevur samtykt neyðuga lógarverkið

– Slík leitingarloyvi eru ikki heimilað í forkanningarlógini, so veruligar oljuleitingar byrja sjálvsagt ikki fyrr enn løgtingið hevur samtykt neyðuga lógarverkið.

PÓL Á KLETTI

Fyrispurningurin, Bjarni Djurholm, løgtingsmaður, hevur sett Edmundi Joensen, løgmanni, í sambandi við framtíðar oljuvinnu í Føroyum, avdúkar nógvar misskiljingar – ikki minst tá talan er um boringarnar í Lopra og leiklutin hjá Maersk-Drilling.

Í einari frágreiðing, landsstýrið hevur biðið Oljufyrisitingina um í sambandi við svar løgmans til Bjarna Djurholm, verður sagt, at tá ið Oljufyrisitingin hevur gjørt so mikið nógv burtur úr at fáa boringina í Lopra tikna uppaftur, so skyldast hetta serliga, at vitanin um niðaru jarðløgini – t.e. jarðløgini undir basaltinum – gera tað lættari at meta um strukturir o.a., sum seismisku upplýsingarnar hava givið ábendingar um.

Onnur orsøk er sjálvandi áhugaverdu ábendingarnar um olju- og gassleivdir, sum fingust til vegar í sambandi við LOPRA-1 boringina. Ein triðja orsøk er, at framhaldandi boringin – um úrslitini gerast »negativ«, t.d. tí basaltið er tjúkri enn væntað – av leiðandi jarðfrøðingum í oljufeløgum ikki verður hildin at køla áhugan fyri oljuleiting á føroyska landgrunninum.

Kanska kann ein siga, at eitt »negativt« úrslit bara váttar tað, sum flestu jarðfrøðingar frammanundan halda, nevniliga, at olja neyvan finst í størri nøgdum undir føroyskum landøki. Verða úrslitini positiv, t.d. tí basaltið er tynnri enn væntað ella tí olja verður funnin, so kann hetta økja munandi um áhugan fyri øllum føroyska økinum – eisini økinum nær landi.

Sum nevnt er Lopra-verkætlanin ein forkanning, sum jarðfrøðingar vóna kann geva nakrar týdningarmiklar upplýsingar, men sum neyvan fer at vísa stórvegis nøgdir av olju og gassi.

Herálvur Joensen, løgfrøðingur á Oljufyrisitingini, heldur tað tí neyvan vera skilagott – soleiðis sum partar av fjølmiðlunum hava gjørt – at siga hesa ætlanina vera byrjan til veruligar oljuleitingar við Føroyar.

– Veruligar oljuleitingar byrja, tá oljufeløgini fáa leitingarloyvi við rætti til at framleiða ta olju, ið tey møguliga finna. Slík leitingarloyvi eru ikki heimilað í forkanningarlógini, so veruligar oljuleitingar byrja sjálvsagt ikki fyrr enn løgtingið hevur samtykt neyðuga lógarverkið, sigur Herálvur Joensen.

Síðan forkanningarlógin varð samtykt og sett í gildi á heysti 1993, eru givin níggju loyvi; seks teirra eru framhaldandi í gildi. Lopra-verkætlanin er sostatt bara ein av fleiri forkanningum, og peningaliga er hon ikki tann størsta forkanningin higartil.



Síðan forkanningarlógin varð samtykt og sett í gildi á heysti 1993, eru givin níggju loyvi; seks teirra eru framhaldandi í gildi. Lopra-verkætlanin er sostatt bara ein av fleiri forkanningum, og peningaliga er hon ikki tann størsta forkanningin higartil






FARVE